## Kina í høvuðstølum

| | |
|---|---|
| Fólkatal | 1,3 milliardir |
| Støðd | 9.600.000 km$^2$ |
| Burðartal | 13,0 promillu |
| Deyðatal | 7,0 promillu |
| Vøkstur | 6,0 promillu |
| Meðallivialdur | 72 ár |
| Aldursbólkur 0-14 | 22% |
| Aldursbólkur 15-64 | 70% |
| Aldursbólkur 65+ | 8% |
| Bejing (Peking) | 14 milliónir |
| Shanghai | 20 milliónir |
| Internetuppkobling | 94 milliónir |
| Forseti | Hu Jintao |
| Stjórnarleiðari | Wen Jiabao |




Kina er orsøk til ein stóran part av prísvøkstrinum á hesum øki, kanska 40%. Skal búskaparvøksturin halda fram, er neyðugt hjá kinesarum at tryggja sær olju, og eftirsum tey gomlu oljufeltini á landi ikki kunnu levera nóg mikið, so liggja kinesarar framvið runt um í allari verðini. Og havr er mesta oljan at finna? Í Miðeystri, sum flestøll vita.

### Oljusamband við Sudan, Niger, Chad, Angola, Gabon, Libya og Saudi-Arabia

Fyri fjúrtan árum síðani hevði Kina onki diplomatiskt samband við Saudi-Arabia, sum er heimsins størsti oljuútflytari. Í dag er sambandið millum hesi lond sterkari enn nakrantíð. Saudi-Arabia byggir oljuraffineringsvirki í Fujian landspartinum í Kina.

Kinesarar hava fingið licens til at vinna gas upp úr undirgrundini í Saudi-Arabia. Gassið skal flytast sum flótandi LNG við tangaskipum til Kina.

Europeisk og amerikansk oljufeløg hava uppgivið at fáast við oljuvinnu í Angola og Sudan vegna borgarakríggj og óstabilitet. Men Kina liggur framvið í hesum londum, og byggja eitt spildur nýtt raffineringsvirki í Sudan. Kanska gevur tað ikki profitt tey fyrstu árini, men tann strategiska markeringin og langsiktaði politikkurin hevur meira at siga enn løtuvinningur.

*"The question about China's economy is no longer what it will do to China but what it will do to the rest of the World"*

Men eisini í Libya, Chad, Niger og Gabon eru kinesarar aktivir, og teir royna at fáa strategiskar, stabilar langtíðar avtalur í lag. Í Australia hava teir (sbr. Newsweek 030405) hava teir gjørt eina avtalu til 21 milliardir dollars í einum nýggjum gas-felti út fyri Vestur-australia, haðan LNG, flótandi gass, skal flytast við tangaskipum til Kina. Hetta er tað sonevnda Gorgon gas-feltið við Barrow Island, sum liggur 1200 km norðan fyri Perth. Eigarar eru Chevron, Exxon og Shell, men Kinesiska CNOOC hevur fingið ein part uppá 12,5% og fáa so eina leveransu uppá 100 mill. t yvir 25 ár.

Í fleiri førum hevur verið hørð kapping millum kinesisk, japansk, amerikansk og europeisk oljufeløg um rættindi at fáa oljuna. Tað er eisini komið fyri, at japansk feløg hava yvirbjóðað tey kinesisku av strategiskum orsøkum. Eitt nú tá ein nýggj pipeline (oljurør) skuldi leggjast úr Sibiria í Russlandi og eysturefti r. Ætlanin var fyrst at leggja rørið frá Angarsk í Sibiria til Daqing í Kina. Men japanarar bjóðaðu hægri, og vildu hava rørið at ganga til russiska havnabýin Nakhodka í Fjareystri, so at tað ikki kom inn á kinesiskt øki. Russiska oljufelagið sá eisini ein fyrimun í hesum. Teir kunnu so í framtíðini senda oljuna við tangaskipi hvar sum helt, og ikki bert til kinesisk raffineringsvirkir

### Økismenning í kinesiskum samanhangi

Framgongdin og ríkidømið er ójavnt býtt. Helst eru tað býirnir fram við havinum, sum hava følt stóru broytingartíðirnar. Shanghai, Beijing og so sjálvandi Hongkong, sum aftur er ein partur av Kina, hava havt eina snarliga framgongd. Inni í landinum er ikki nógv broytt. Landbúnaðarøkini framleiða matvørur til stórbýirnar og flytingin av bygd til bý gongur skjótt, og bílig arbeiðskraft er tøk í teim skjótt vaksandi býunum. Úrslitið er, at Kina, sum einaferð setti útjavning sum høvuðsmál, í dag er eitt tað ójavnasta samfelagi í Asia.

### Tað knirkar og brakar í strategisku javnvágini

Í 1900-talinum var kappingin og rivaliseringin millum lond mest sjónlig í Europa. Tvey heimskríggj brustu á og ein bolsjevikkisk kollvelting kom at forma politikkin í hesum heimsparti. Úrslitið var, at USA kom fram sum tann avgerandi super-maktin, bæði militert, politiskt og búskaparligt. Royndirnar hjá Sovjet at "loypa kapitalismuna um" og gerast førandi heimsveldi miseydnaðust. Veruligar royndir at demokratisera stýrið miseydnaðust eisini, og sama gjørdu royndirnar hjá Gorbatjov at bøta um og effektivisera búskapin. "Perestrojka og glasnost", umlegging og gjøgnumskygni, sum vóru loysunarorðini hjá Gorbatjov, endaðu í kaos og upployns. USA er í dag heimsins super-makt uttan stórvegis kapping frá øðrum.

Men nýtt veksur fram, og fer at krevja sítt pláss. Eg hugsi her mest um Europa og Kina. Europa hevur verið spjatt millum smærri og størri statir, men nú eru 25 av teimum saman í EU (ella ES). Europa kann, í hesum líki, koma at spæla ein heilt nýggjan leiklut í heimspolitikki. Og "hinumegin" veksur eitt sterkt Kina fram. Tað hevur verið samanborið við tað sum hendi, tá USA fyri umleið 100 árum trein inn á heimsvøllin sum eitt stórveldi. Ella eisini, um nakað somu tíð, tá Týskland kom fram og kravdi "lebensraum".

### Vøkstur við snarferð kann elva rumbul

Nógar metingar hava verið frammi um politiska og búskaparliga stabilitetin í Kina. Tað hevur víst seg higartil, at kommunistaflokkurin, sum enn er einaráðandi, hevur verið førur fyri at stýra processini, og eisini hevur tillagað seg. Seinastu broytingarnar í floksleiðsluni eru farnar fram uttan stórvegis buldur. Flokkurin hevur tó verið førur fyri at geva nýggja meðalklassanum í býunum góð livilvkor. Men demokrati og pluralisma finnst ikki.

Í mun til grannalondini eru nógv viðurskiftir og nógvir stríðsspurningar, sum eru óloystir. Taiwan er enn við amerikanskari hjálp ikki ein partur av Kina. Nógvar smærri oyggjar í havinum út fyri Kina verða kravdar av fleiri londum, og tað kann føra til stríð, tí her finnst olja. Og Japan, sum leingi hevur verið eitt stórveldi har á leið, følir seg hótt og kroyst á fleiri økjum.

Kina er ikki bert ein nýggj asiatisk búskaparlig rakett aftrat, so sum Japan, Suðurkorea, Taiwan, Singapore, Malaysia og Hong-Kong. Nýggja Kina er eitt fyribrigdi, sum komandi 100 árini kemur at broyta strategisku javnvágina, og harvið myndina av allari Verðini.

**Keldur:**

K.E. Brødsgaard: "Det bliver Kinas århundrede" Jyllands-Posten 29.3.05
R.J. Samuelson: "The World's Powerhouse" Newsweek International 31.5.04
"A brother for her" The Economist 16.12.04
M. Liu: "Hungry for Power" Newsweek 3.5.04



*Áhugafelagið Dansk Industri hevur, sambært Jyllands-Posten, roknað úr, at danskir brúkarar hava spart íalt 63 mia. kr. við at keypa bíligar vørur úr Kina og øðrum asiatiskum londum. Uppá íbúgvan gevur hetta fyri Danmark eina sparing uppá umleið 12.000 kr, ella kanska eina mánaðarløn eyka*

*Modellmynd*